# Økt viðbót til pensjonistar

ÓLAVUR Í BEITI

Marjus Dam hevur fyri Sambandsflokkin lagt eykajáttanaruppskot fyri februar 2000 fram.

Í viðmerkingunum, sigur Marjus Dam, at á løgtingsfíggjarlógini fyri fíggjarárið 2000 eru játtaðar 12,2 mió. kr. til endamálið. Hetta er sama upphædd, sum varð játtað í 1999. Árliga viðbótarupphæddin fyri 2000 verður 3.387 krónur, útgoldin í trimum gjøldum upp á 1.129 krónur hvørt. Í 1999 var upphæddin 3384 kr. til hvønn pensjonist, ið uppfyllir treytirnar.

Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið, er stuðulin ætlaður sum ískoyti til olju, sjónvarp- og útvarpsgjald.

**Yvir 13 mió. kr.**

Og nú bæði útvarps- og sjónvarpsgjald fara upp, og tá Sambandsflokkurin metir, at bæði útvarp og sjónvarp eru neyðugir miðlar hjá øllum borgarum í landinum, er tað bert rímiligt, at hækkingin av hesum gjøldum verður kompenserað við eini øktari viðbót, ið svarar til hækkingina av útvarps- og sjónvarpsgjaldinum, til teir pensjónistar, ið lúka treytirnar um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.

Sambandsflokkurin mælir til, at veitt verður eykajáttan, ið svarar til hækkingina. Talið av pensjónistum, ið fáa hesa viðbót í 2000 er 3829.

Samlaða hækkingin av útvarps- og sjónvarpsgjaldinum hjá hesum pensjónistum verður 885.532,83. Mælt verður tí til, at viðbótin til pensjonistar verður hækkað við kr. 886.000 og sett til kr. 13.086.000.

# Sum at spæla í happadrátti at fáa tunfiskaloyvi

ÓLAVUR Í BEITI

Dan R. Petersen, løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin, hevur spurt fiskimálaráðharran Jørgen Niclasen 11 spurningar um tunfisk og annað í sambandi við henda fiskiskap

Løgtingasmaðurin vil hava at vita, hvussu mong tunfiskaloyvir vóru í nýtslu seinasta ár? Hvussu mong vóru ikki ikki í nýtslu? Hvussu mong loyvir hevur landsstýrismaðurin drigið inn aftur og við hvørji grund? Hvørji feløg/persónar sita við tunfiskaloyvum? Hvussu er býtið millum føroysk og útlendsk skip, ið fiska tunfisk? Hvussu mangir føroyingar og hvussu mangir útlendingar manna tey fremmandu skipini? Hvussu mikið gjalda útlendingar hvørjum loyvishavara fyri fiskiskapin? Hvat metir landsstýrismaðurin, at land og fólk fær burturúr, at feløg/persónar handla loyvir víðari til útlendingar? Hvørjar fortreytir liggja til grund fyri avgerðini um, hvør fær tunfiskaloyvi? Ætlar landsstýrismaðurin at geva royndarloyvir í altjóða sjógvi, ella er nakað givið? Hvørja upplýsingaskyldu hava tunfiskaskip, landsstýrið og Fiskirannsóknarstovan?

**Einki mynstur**

Í viðmerkingunum sigur Dan R. Petersen, at havsins tilfeingi, fiskurin, er fólksins ogn. Hvussu henda meginregla skal tolkast, eru menn ikki heilt samdir um. Tó er vist semja um, at fólksins ognir skulu koma flest møguligum til góða, manning, reiðara, landinum.

– Seinastu árini hava víst, at tunfiskur er í føroyskum sjógvi ein part av árinum, og at tað loysir seg at fiska hann. Hetta hevur eggjað monnum, og umsóknir eru sendar landsstýrinum um royndarveiðu. Sum í happadráttinum hava summir verið hepnir, meðan aðrir hava drigið svart; onkur hevur mist á borði, hvat loyvum viðvíkur.

– Torført er at síggja nakað fast mynstur fyri, hvørjar fortreytir liggja til grund, tá ið loyvir verða givin, sigur Dan R. Petersen í viðmerkingunum til spurningarnar.



*Seinasta summar hittust Nyrup og Kallsberg til ríkisfundar í Tindhólmi. Í summar skulu teir aftur hittast til hólmgongu um ríkisrættarligan sáttmála. Men hvar fundurin verður, er enn ikki greitt...*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Danir krevja góða tíð at fyrireika seg

*Tá Nyrup hevur fingið útspælið frá føroyingum í ríkisrættarliga spurninginum, fer hann at krevja góða tíð at fyrireika seg, áðrenn hol verður sett á veruligu samráðingarnar*

JOHN JOHANNESSEN

Løgmaður og Nyrup hittast á fyrsta sinni um ríkisrættarliga spurningin í mars. Men hetta merkir ikki, at hol verður sett á samráðingarnar longu tá.

Hetta ger kunningarráðgevin hjá danska forsætisráðharranum okkum greitt. Hann sigur, at Poul Nyrup Rasmussen fegin vil hitta landsstýrið á einum innleiðandi fundi í mars, har eitt útspæl frá landsstýrinum verður lagt fram. Men danska stjórnin ætlar sær ikki at samráðast um hetta útspæl fyrr enn hon hevur fyrireikað seg væl og virðiliga.

Kunningarráðgevin hjá forsætisráðharranum segði seg ikki kunna siga, hvussu langa tíð danska stjórnin fer at krevja til at fyrireika seg í. Tó hava danskir fjølmiðlar áður nevnt eitt tíðarskeið á fýra vikur.

**Partvís kunnaðir**

Danskir politikarar standa kortini ikki heilt á berum, nú samráðingarnar við føroyingar um ríkisrættarligu støðuna nærkast. Í seinastu viku fingu allir fólkatingslimir nevniliga ein samandrátt av stevnumiðum landsstýrisins í fullveldismálinum.

Hesin átta síðu langi samandrátturin inniheldur eitt yvirlit yvir málini hjá landsstýrinum, eina frágreiðing um framferðina hjá landsstýrinum í fullveldismálinum og at enda ein kapittul um støðið undir politisku tilgongdini.

Í kapitlinum um framferðina í politisku tilgongdini verður greitt frá fullveldisætlanini sum politiskt mál, frá neyðugu fyrireikingunum, hvussu samráðingarnar við donsku stjórnina skulu fara fram og at enda, hvussu endliga fólkaræðisliga avgerðin verður tikin.

Í kapitlinum um støðið undir politisku tilgongdini verður greitt frá viðurskiftunum millum Føroyar og Danmarkar somuleiðis, sum grundgivið verður fyri, hví hesi viðurskifti skulu broytast. Eisini verður greitt frá fíggjarviðurskiftum Føroya í sambandi við Danmark, og kemur hetta brot inn á, at heimastýrisskipanin ikki hevur gjørt Føroyar meira fíggjarliga sjálvbjargnar, men heldur øvugt. Her verður sipað til nógv umtalaða blokkstuðulin.

Eisini vísir landsstýrið í frágreiðingini til fólkatingslimirnar á, hvussu týdningarmikið tað er fyri føroyingar at fáa eina skipan, ið ger, at føroyingar sjálvir taka uttanríkispoltiskar avgerðir.

**Skulu síggja sáttmálauppskotið**

Sum skilst á dønum, meta teir ikki skrivið til fólkatingslimirnar sum nóg gott grundarlag fyri at kunna fyrireika seg til samráðingarnar við Føroyingar.

Løgmaður hevur fyrr meldað út, at hann, tá hol verður sett á samráðingarnar, fer at leggja eitt sáttmálauppskot fyri danska forsætisráðharran. Og, sum skilst, er tað hetta sáttmálauppskotið, Poul Nyrup Rasmussen vil hava í hendi áðrenn hann saman við stjórnini fer at fyrireika seg endaliga til samráðingarnar.

# Býráðið má traðka til fyri landsstýrið

JOHN JOHANNESSEN

Mentamálanevndin hjá Tórshavnar Býráð hevur mælt býráðnum til at játta 400.000 krónur til gomlu margarinfabrikkina. Orsøkin til, at býráðið má traðka til er, at Almanna- og Heilsumálastýrið hevur boðað frá, at tað ikki longur kann veita hesa stuðulsupphædd til aktivering av ungdóminum í Havn.

Fíggjarnevndin skal í dag viðgera málið, og síðani kemur tað fyri á býráðsfuindi í kvøld, har tað væntandi verður samtykt.



# Í býin - altíð eitt stað at fara


Streymoy

Manhattan PUB & CAFÉ
Hóskvøldið 17.02
Opið frá: 17.00-24.00
LIVE JAZZ
v/ Mikal Blak og Herluf Lutzen

Casablanca
Fríggjakvøldið 18.02
Opið frá: 23.00-03.30
Diskotek
DJ Rúni Kjær
18 ára aldursmark
ÓKEYPIS ATGONGD

Leygarkvøldið 19.02
Opið frá: 23.00-03.30
Diskotek
v/ Petur Slyne
Kostnaður innan kl. 01.00: 50,-
Kostnaður eftir kl. 01.00: 100,-
íroknað eina ókeypis drykkjvøru
NÝTT: Casablanca hevur fingið størri dansigólv

Long drinks Café
CLEOPATRA
Við gongugøtuna
Opið er:
Mán.– Hós. kl. 19.00 – 23.30
Fríggjadag kl. 17.00 – 03.30
Leygardag kl. 19.00 – 03.30
Sunnudag kl. 17.00 – 23.30

Kaggin
ROBERT & VINMENN
spæla til dans fríggja- og leygarkvøldið
Gestatónleikari er Jógvan Dahl úr Faroe Boys
Kaggin Kaggin Kaggin
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

NÁTT-BUSSURIN
v/ Øssur Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

SKAR‹HAMAR´S BUSSKOYRING
v/ He›in Skar›hamar, Sleipnisgøta 13. B, FO–100 Tórshavn
TAXA
MINI BUSS TIL 10 FER‹ANDI
288888
FR • VISA • EUROCARD • MASTERCARD • JCBCARD

MINI BUSS TAXA 3X21

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra - so er tað 311234
AUTO
BENZIN DIESEL KIOSK - ALTDØGNIÐ -
AUTO 311234

CAFÉ NATÚR
* * *
Staðið harvit hittast
***

Lesið sosialin sosialin

Í BÝIN
Fylgið við hvat hendir kring oyggjarnar í vikuskiftinum
sosialurin

fk Matseðilin
Hósdagin 17. feb.: Høsnarungar
Fríggjadagin 18. feb.: Boston steik
Leygardagin 19. feb.: Svínakambur
Mánadagin 21. feb.: Kjøtfrikadellir
Týsdagin 22. feb.: Stokt flesk v/persillusós
Mikudagin 23. feb.: Barbeque rib
Kostnaður 30,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari ella Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

Nor›oyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Leygarkvøldið 19/2 vendir "BILL" plátum
Sosialurin - 311820
Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY


## Vilja tygum vi› í Í b‡in - hvønn hósdag

Ynskja tygum at l‡sa í teiginum ***í b‡in***, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur